# ítróttur

Nr. 50 • leygardagur • 12. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Klassikarin á Hálsi

**Nýklaktu føroyameistararnir úr VÍF skulu sunnudagin til Havnar at dystast móti gomlu meistarunum úr Kyndli í klassisku uppgerðini millum teir báðar føroysku hondbóltsrisarnar**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*VÍF hevur longu vissað sær gullið, men fyri tað er einki at ivast í, at Kyndilsmenn heldur enn fegnir vilja hava stigini*

Kappingin hjá monnunum er um at verða av, og føroyameistararnir eru longu funnir. Vestmenningar tryggjaðu sær seinasta leygardag føroyameistaraheitið, men hetta merkir tó ikki, at teir fara at gera sítt allarbesta fyri at basa Kyndli á Hálsi sunnudagin.

### Kyndil vil hava uppreisn

VÍF hevur verið nógv tað besta liðið í endaspælinum, og tað er fult uppiborið, at teir longu eru meistarar. Kyndil hevur hinvegin verið eitt stórt vónbrot, og tað eru leikararnir hjá havnarfelagnum eisini greiðir yvir sjálvir. Tað man tí verða lítið at ivast í, at teir eru ógvuliga uppsettir til sunnudagin, har teir kunnu fáa uppreisn móti vestmenningum og harvið bjarga sær eitt sindur av kappingarárinum. Harumframt kann Kyndil framvegis missa silvurið, tí strandingar eru beint í hølunum á teimum, og um Kyndil snávar, kann StÍF vinna seg upp á annaðplássið við einum sigri á KÍF.

Talan er um klassikaran í føroyskum manshondbólti, og tað er einki at taka seg aftur í, at hesir dystir altíð eru nakað serligt, og at tað er ein serligur hýrur til dystirnar millum Kyndil og VÍF bæði í Havn og í Vestmanna.

Sum áðurnevnt hittast steypavinnararnir úr StÍF og KÍF á Skála sunnudagin, og her eru tað fyrst og fremst strandingar, ið hava nakað at spæla fyri. StÍF liggur í løtuni á bronsuplássinum, men stutt er upp til silvurið. Um strandingar megna at vinna silvurið, er tað eitt lítið bragd, tí StÍF fekk eina serstakliga vánaliga byrjan upp á kappingarárið, og teir høvdu bestan hugin at avskriva alt árið.

Kollfirðingar vóru nýliga á bronsuplássinum, men teir hava snávað í seinastu umførunum, og samstundis hevur StÍF tikið seg fram á stigatalvuni og yvirhálað teir.

Ein dystur verður eisini í Hoyvík, har tey bæði niðastu liðini, H71 og Neistin, hittast. Her er bert heiðurin at spæla fyri, og ilt er at meta um, hvussu fer at ganga í hesum dysti. Tó skilst á lagnum, at hoyvíkingar noyðast at verða sterka liðskiparan, Halgir Dahl-Olesen, fyriuttan, tí at hann er burturstaddur í arbeiðsørindum. Hetta er ein stórur smeitur hjá hoyvíkingum og økir ivaleyst um møguleikarnar hjá Neistanum at fáa ein sigur til høldar.

## Fýra dystir í Løgmanssteypinum

Í kappingini um Løgmanssteypið verða fýra dystir á skránni um vikuskiftið. Enn eru liðini úr bestu deildini ikki við, men fleiri av sterkastu liðunum í 2. deild skulu í dyst sunnudagin.

Eitt nú skal AB til Leirvíkar í eini reinari 2. deildaruppgerð, og tá verður spennandi at síggja, hvussu sterk hesi bæði lið eru í ár. Í Vágum verður lokaluppgerð, tá ið Sørvingar fáa vitjan av FS Vágar 2004.

Hinir báðir dystirnir eru Sumba-MB og NÍF, sum er liðið hjá nólsoyingum, móti Fram.

**tn**

## Dystaryvirlit

| | | |
|---|---|---|
| **Hondbóltur:** | | |
| **Sunset-kappingin 12.03.05** | | |
| Kl. 15.00 | Søljan-VB | Giljanes |
| **13.03.05** | | |
| Kl. 14.30 | StÍF-VB | Skála |
| Kl. 15.00 | Tjaldur-VÍF | Runavík |
| **Atlantic Airways-kappingin 13.03.05** | | |
| Kl. 16.00 | Kyndil-VÍF | Hálsi |
| Kl. 16.00 | StíF-KÍF | Skála |
| Kl. 16.00 | H71-Neistin | Hoyvík |
| **Flogbóltur:** | | |
| **Meistaradeildin kvinnur 12.03.05** | | |
| Kl. 14.00 | ÍF-Dráttur | Kambsdalur |
| **13.03.05** | | |
| Kl. 14.00 | Mjølnir-SÍ | KÍ-høllin |
| Kl. 15.00 | TB-KÍF | Trongisvágur |
| **Meistaradeildin menn 12.03.05** | | |
| Kl. 16.00 | ÍF-Fleyr | Kambsdalur |
| Kl. 16.30 | Mjølnir-SÍ | KÍ-høllin |
| **Fótbóltur:** | | |
| **Løgmanssteypið 13.03.05** | | |
| LÍF-AB | | |
| Sumba-MB | | |
| SÍ-FS Vágar 2004 | | |
| NÍF-Fram | | |

## Til Klaksvík eftir gullinum

**Menninir hjá SÍ fara leygardagin til Klaksvíkar at taka ímóti steypinum og gullheiðursmerkjum.**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Leygardagin spæla sørvingar seinasta dystin í einum minniligum kappingarári. Í ár eru tað júst 100 ár síðani, at SÍ var sett á stovn, og hetta valdi mansliðið hjá sørvingum at hátíðarhalda við at vinna greipuna.

### Møta gomlu meistarunum

Tað er eisini rættuliga hóskandi, at tað er júst í Klaksvík móti Mjølnir, at SÍ fær handað steypið og heiðursmerkir, tí klaksvíkingarnir vóru jú meistarar í fjør, og harafturat var Mjølnir jú eisini mótstøðuliðið hjá SÍ í steypafinaluni.

Dysturin hevur sum so einki at siga, men tað man verða lítið at ivast í, at sørvingar fegnir vilja enda kappingarárið við maner og prógva enn einaferð, at teir hava nógv tað besta liðið í landinum. Hinvegin vilja klaksvíkingar óivað eisini vísa, at tað framvegis er dugur í teimum.

Ein annar dystur er í meistaradeildini hjá monnum leygardagin, og hann er á Kambsdali, har ÍF fær vitjan av Fleyr. Hesin dysturin hevur heldur ikki nakran serligan týdning, tí Fleyr liggur á einum tryggum bronsuplássi, meðan ÍF liggur púra trygt á fjórðaplássinum.